ingum, sum hava gingið hjá teimum, hava fingið stuðul og hjálp í komandi skúlaári, og tríggir næmingar eru nú farnir út vegna aldur. Teir báðir næmingarnir, sum hava fingið stuðul og tímar, hava allir eina diagonosu, og teir flestu stuðlarnir eru settir úr starvi. Onkur næmingur er áhugaður at fara á Orðblindaskúla í Danmark í eitt hálvt ár, so familjan má helst flyta til Danmarkar í

**Teir lesi/skriviveiku næmingarnir skulu gjalda prísin, sjálvt um skúlin sjálvur í fleiri førum hevur framleitt hesar skrivi/lesiveiku næmingarnar, tí tað hevur ikki verið tikið hond um teir frá fyrsta degi av í skúlanum**

eitt hálvt ár, og tað kostar nógvar pengar. Onkur familja hevur keypt sær bæði útgerð og stuðul, so stuðulin kann koma heim til teirra at gera heimaarbeiði við næminginum. Teir lesi/skriviveiku næmingarnir skulu gjalda prísin, sjálvt um skúlin sjálvur í fleiri førum hevur framleitt hesar skrivi/lesiveiku næmingarnar, tí tað hevur ikki verið tikið hond um teir frá fyrsta degi av í skúlanum.

### Taka hond um næmingin

– Næmingarnir hava heimaarbeiðið við, tá ið teir koma til okkara. Ofta skriva teir tær skriftligu uppgávurnar hjá okkum, og teir læra at brúka forrit, sum skrivestøtte og CD orð til føroyskar, danskar og enskar uppgávur. Vit læra teir at skanna tekst og fáa tekstin lisnan upp, um tað so er á føroyskum, donskum og enskum. Vit hava eisini forrit, sum lesur upp, tað teir siga á donskum og enskum. Vit læra teir eisini at rætta tekstin við rættstavara. Stundum gjøgnumganga vit tað við teimum, sum teir hava fyri í landalæru, søgu, kristni o.ø. Vit hava ymiskar snildar mátar at arbeiða við fyrisøgnum,og vit hava fingið gongd á rættskriving við børnum, sum als ikki hava dugað ella torað at skriva frammanundan. Men tað, sum hevur gjørt munin er, at vit hava tikið hond um næmingin, har hann er, og vit hava tosað við hann og víst á allar møguleikarnar, hann hevur og givið honum eitt herðarklapp, sigur Hallgerð Arge Hansen.

Hon sigur, at teir fáu tímarnir, sum verða givnir til serligan tørv, mugu verða lagdir inn á tímatalvuna sum skjótast. Serliga nú, áðrenn tímarnir hjá serlærarunum verða lagdir, so serlærari, lærari, leiðsla og næmingur kunnu samstarva í einum toymi, og har øll lurta hvør eftir øðrum, og hetta verður tikið til eftirtektar, og øll vita hvør av øðrum, eisini so at serlærarin kann fyrireika seg til tað komandi tilfarið.

### Mugu keypa sær stuðul

– Eingin annar enn tit foreldur kunnu hjálpa tykkara børnum. Keypið teimum telduútgerðina og keypið teimum ein stuðul, um tit hava møguleikar til tað, so skulu vit royna at læra tykkum, stuðulin og næmingin at arbeiða við hesum teldutillagaða tilfari, so børnini megna heimaarbeiðið.

Men gerið kortini eitt gallróp. Tað nyttar lítið at kæra, tí eingin kærustovnur er settur enn, hóast fólkaskúlalógin mælir til hetta. Í einum áliti ella tilmæli um ábyrgdarbýtið viðvíkjandi skúlabørnum við serligum tørvi frá 2006 stendur, at kærunevnd eigur at verða stovnsett, at setanarviðurskiftini hjá stuðlum í fólkaskúlanum eigur at verða broytt, og at setast skal samstarvsnevnd at samskipa tilboð til børn við serligum tørvi. Tey nevna eisini, at tørvur er á 6.35 mil. afturat. Men allir stuðlar eru jú settir úr starvi, og við ongari kærunevnd ber illa til at kæra til tann, sum hevur sett allar sparingar í gongd.

– Hetta var so úr einum tilmæli, sum ein nevnd gjørdi, fyri at betra um korini. Hvussu nógv slík tilmæli liggja ikki goymd í skuffum og samla støv, og tey hava helst kostað fleiri milliónir, sigur Hallgerð Arge Hansen.

### Kompetansusentrið

Hon var í øðrum ørindum í Århus, og har hoyrdi ehon um eitt kompetansusentur fyri næmingar í miðdeildini, sum høvdu fingið tillutað ein telduryggsekk. Næmingar á hesum sentri vóru savnaðir úr allari kommununi. Teir fingu undirvísing í at brúka telduryggsekkin, og teir arbeiddu við ymiskum evnum, og tá ið hon var har, arbeiddu teir við evninum tónleiki.

Tað var eitt sindur ymiskt, hvussu leingi teir vór á sentrinum, summir flokkar vóru tveir mánaðir og aðrir styttri, men nú dugdu teir sjálvir at taka sær av heimaarbeiðnum.

– Hetta er nakað av tí, sum vit royna, men okkara børn koma bara eina ella tvær ferðir um vikuna nakrar fáar tímar, og tí mugu vit eisini hjálpa teimum við heimaarbeiði. Men ein dagskúli í ein mánað til hvønn flokkin kring landið av hesum næmingum, sum høvdu fingið ein telduryggsekk, hevði gjørt øgiligan mun, serliga um næmingarnir eisini høvdu fingið hjálp, sigur Hallgerð Arge Hansen.

### Smarttalvur

– Nú so nógvir skúlar hava keypt smarttalvur við kanón og teldu til hvørja stovu, hevði tað verið smart, um teir eisini høvdu keypt ein telduryggsekk til hvørja stovu, tí nógv av forritunum kunnu vera hent til allan flokkin, og hjá næmingunum, sum halda seg lesa ov seint, kann tað at skanna tekst og fáa tekstin lisnan upp vera ein góður møguleiki.

Í felagnum Skrivi/lesiveik síggja tey týðuliga, at meginparturin av teimum næmingum, sum hava fingið hjálp frá teimum, hvørki mangla vit ella skil, men tey hava fingið skeiva fótin inn um skúlagátt, og sjálvsálitið hjá teimum er farið í sor. Byrjanarundirvísingin hevur verið ov grunn, og skúlin hevur ikki havt góðar møguleikar at taka hond um tann einstaka næmingin, serliga

**Eg havi ikki so nógv ímóti at børn fara í skúla sum seks ára gomul. Men tað ber ikki til at koyra seks ára gomul í skúla til ta byrjanarundirvísing og teir karmar, sum nú eru í skúlanum**

tá ið flokkurin hevur verið stórur og sera ymiskt samansettur.

### Øðrvísi byrjanarundirvísing

Nógvir barnagarðar gera nógv burtur bæði talimáli, leik og spæli.

Tey taka nógvar myndir av børnunum, meðan tey eru virkin og skriva um hetta virksemið og geva børnunum hetta heim við. Hetta er eitt gott forarbeiði til komandi skúlaarbeiði, heldur Hallgerð Arge Hansen.

– Vit mugu byrja við børnunum og teirra upplivingum við talimáli og teksti, sum børnini sjálv hava sagt og gera lesitilfar saman við teimum, tí tá fáa vit bæði sosialiseringina og motivatiónina saman við. Seinni ber til at fara inni í liðugtgjørt tilfar. Eg havi ikki so nógv ímóti at børn fara í skúla sum seks ára gomul. Men tað ber ikki til at koyra seks ára gomul í skúla til ta byrjanarundirvísing og teir karmar, sum nú eru í skúlanum. Míni ráð eru: broytið karmarnar og broytið hugburðin og arbeiðið nógv meira við talimálinum, leiki og spæli. So kanska vit um nøkur ár við góðari byrjanarútbúgving kunnu fáa seks ára gomul børn í skúla. Men ikki við 40 børnum og einum ella tveimum lærarum. Tað er betri við smáum bólkum og tveimum lærarum, so vit fáa eygleitt børnini og givið tí einstaka barninum gætur, lurta eftir tí og veita tí ans, tí missa vit børnini her, verður trupult at fáa tey í gongd seinni, sigur Hallgerð Arge Hansen.

Henni dámar væl, at Helena Dam á Neystabø nú fer at prioritera byrjanarundirvísingina,

Men tað kostar nógvar pengar, nógva tíð og yrkisføri.

### Krevur nýhugsan

Nøkur foreldur hava sjálv keypt útgerðina, og Hallgerð Arge Hansen er fegin um, at tey vilja børnum sínum so væl, at tey vilja gjalda. Um tey also hava ráð at gjalda.

Ein onnur forðing er, at tað er torført at fáa lærarar í gongd við hesa undirvísingina, tí teir fægstu lærararnir kenna hesi amboð og duga tí ikki at brúka tey. Fyrsta stigið má tí vera at fáa undirvíst fleiri lærarum í hesum.

Hallgerð Arge Hansen veit, at heilt nógvir lesiveikir næmingar ongantíð fáa nakra hjálp. Teir veikastu næmingarnir sleppa at gjalda rokningina.

Hon heldur lítið um, at næmingar verða tiknir út úr flokkinum ein tíma ímillum. Fyrst av øllum ræður um at fáa tann veika næmingin at virka inni í flokkinum, og at hann fær læring har. Fær næmingurin ein KT-ryggsekk, kann hann sjálvur sita og læra seg, tí hann fær alt lisið upp av telduni. Hitt koyrir bara næmingin niður, og so kostar tað milliónir.

Men útgerðin kostar í minsta lagi um 12.000 – til 15.000 kr. Tey ungu læra so skjótt alt tað tekniska, nógv skjótari enn tey vaksnu, so er viljin at læra til staðar, eru nógvir møguleikar.

Tað sær út sum, at henda teldutillagaða undirvísingin eisini er við at koma inn um skúlagátt, men tað krevur pengar, nýhugsan og eitt annað undirvísingarlag. Helst skulu lærarar og børn hava hesi amboðini í skúlanum eisini.

– Nógv kann gerast uttan øll hesi hjálpartólini, men í dag er so øgilig framgongd innan tøkni, og nú vit hava arbeitt við KT-ryggsekkinum fyri felagið Lesi/skriviveik er ein sólskinssøga fyri og onnur eftir at síggja, sigur Hallgerð Arge Hansen.



*Tað ræður um, at børnini longu frá byrjan í skúlanum fáa góða undirvísing, sigur Hallgerð Arge Hansen*
(savnsmynd)